

# Vatnmeistari

Tórshavnar kommuna søkir eftir vatnmeistara. Undir leiðslu av teknisku deild, røkir vatnmeistarin hesar uppgávur:

- stendur fyri og hevur rakstrarábyrgd av viðlíkahaldi og útbygging av vatnkervinum
- hevur dagligu leiðsluna av vatnverkinum um hendi
- hevur umsitingarligu ábyrgdina av amboðum, maskinum og húsum, ið eru knýtt at vatnverkinum
- luttekur í skráseting av vatnleiðingum

Talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Fakligir eginleikar**
Vit vænta, at tú hevur maskintekniska útbúgving, hevur leiðsluroyndir og kunnleika til rørleiðingsarbeiði v.m. Tú skalt hava koyrikort. Eisini krevst kunnleiki til teldutøkni, t.d. teldukoyrikort.

**Persónligir eginleikar**
Vit hugsa okkum, at tú ert 35 til 45 ára gamal. At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og ert málsøkjandi og fyrikomandi. Ert førur fyri at taka skjótar og rættar avgerðir og at hugsa rationelt.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett við 1 árs royndartíð, løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Viggo Christiansen, deildarleiðara, ella Boða Haraldsson, býarverkfrøðing, tlf. 302010 ella 214015.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. oktober 2006.

**Vatnverkið**
Vatnverkið heldur til í Tórfinsgøtu 21, og har starvast 9 mans.

Høvuðsarbeiðið á vatnverkinum er at tryggja støðuga vatnveiting í kommununi, og í hesum sambandi at hava eftirlit við vatnkervinum.

Fremja umvæling av verandi vatnleiðing, og nýgerð í sambandi við m.a útstykkingar v.m. Í kommununi eru 9 størri og smærri reinsiverk.

Samlaða vatngoymslan í kommununi er 1.400.000 $m^3$, árliga nýtslan er 3.500.000 $m^3$.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

Lesið Sosialin - so eru tit við

**SKEIÐ Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA 2006-2007**

Próvskeið í enskum

a) ***Skeið til Cambridge First Certificate in English*** byrjar í Ovastovu í Nóatúni 19. oktober í einum flokki við undirvísing hósdag kl. 13.00-16.00.
-Fortreytir: 10. floks støði ella samsvarandi kunnleiki, ávísur førleiki í at nýta málið, talað og skrivað.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

b) **Skeið til Cambridge Certificate of Proficiency in English** byrjar í Ovastovu í Nóatúni 18. oktober í einum flokki við undirvísing mikudag kl. 9.00-12.00.
- Fortreytir: Staðið "Advanced English", málsligt students-, HF-, HH-prógv ella samsvarandi, góðan førleika at nýta málið.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

Próvtøkurnar verða í mai/juni 2007.

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni. Tilmeldingarfreistin er sett til 6. oktober 2006. Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, sohvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

**Tilmeldingargjaldið er 650 kr.**

Fyri próvtøku í First Certificate in English gjalda næmingar 800 kr.
og fyri próvtøku í Certificate of Proficiency in English 1.000 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

***FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA***
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo



# LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo

**RUKO LÁSATÆNASTA**

Ruko

- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem



Vit eru serkønir á økinum

**VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ** · *TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA*
SKÁLATRØÐ 14 • TÓRSHAVN • TEL 30 10 20

# Verkfrøðingur/ byggifrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi, byggifrøðingi ella starvsfólki við líknandi útbúgving ella royndum.

Førleiki at tekna við AutoCAD ella møguliga øðrum CAD forriti er ein fyritreyt. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan okkara virkisøki, sum er vatnveiting, kloakering og HVS-installatiónir.

**Martin E. Leo Sp/f**
Ráðgevandi verkfrøðingar · tlf. 311488 · fax 315488
Tórsgøta 24 · 110 Tórshavn · t-post: martin@mel.fo